# So skerdu teir eikina Stórá – um vatnorkuútbygging í Eysturoy

INGVARD FJALLSTEIN



**Uttan nakað hóvasták eru áirnar við Norðskála tiknar upp í vatnorkuskipanina við Eiðisvatn. Hvat fingu vit burturúr, og hvussu sær út?**

Sum ein eik hevur Stórá við Norðskála ligið í lendinum í túsundi av árum. Rótin á Móstøðuni í Sundinum, og bulurin úr sjóarmálanum og niðan í Skálagjógv niðanfyri landsvegin. Omanfyri landsvegin savnast greinarnar úr ymsum ættum.

Undan Gráakletti og Gráasteini fyri norðan kemur Daláin so smoykin. Tippisá við sínum løkum kemur av Skálaskarði, oman ígjøgnum Ovaru fossar og Niðaru fossar og Fossagjógv. Stundum er fossurin í Fossagjógv ein lítil løkur, sum sigur stillar søgur um blómur og fuglar á leiðini. Aðrar tíðir sum froysandi ódjór, ið vil taka trøllið í fossinum við sær í ferðini, men enn stendur tað líka treiskt, sum tað hevur staðið í øldir.

Síðani leikar Tippisá oman í Dal, har niðurfalnu kráarløgini standa tøtt fram við áar¬bakk¬anum, og boða um lív í farnum tíðum. Niðri í Tippi leggjast greinar afturat undan Fossabrúgv og Breiðateigi.

Skarðsá kemur av Skarðinum undir Nøvini oman móti Tingheyggi, og fellur niður í Gjønna sunnanvert Tingheygg. Skálá savnar sær løkir úr lendinum undir Stórarókshamri og Lokkafelsryggi. Hon savnar eisini løkir úr Lokkafelsduri, sum í øldir hava grivið sær legu ígjøgnum Lokkafelsrygg. Skálá fellur somuleiðis í stórbarum fossi niður í Gjønna sunnanvert Tingheygg. Úr Gjønni gongur leiðin oman á Túvu.

Í tronganum við Djúpakassarygg renna áirnar saman, og fara froysandi oman í Djúpakassa, Skálagjógv, Antarvað og á Móstøðuna. Ósan, sum einaferð var verdur eina mørk, tí har vaks krækjlingur í ríkum meingi. Har heilsast áin og havið.

**Vatnorkuútbygging**

Fyri nøkrum árum síðani varð farið at gera vatntunil millum Svínáir og Norðskála, soleiðis at vatnið úr áunum við Norðskála kundi leiðast norður til Eiðisvatn. Henda verkætlanin verður ofta nevnd Eiði2.

Vegur varð gjørdur til munnan til vatntunil nakað sunnanfyri og niðanfyri tunnilin á landsvegnum við Norðskála. So varð farið at spreingja. Bygdarfólkið við Norðskála kvakk við av ristingum og fjalladuni bæði á degi og nátt í langa tíð. Henda ófrætta fráboðanin fjaraði so líðandi burtur, so hvørt sum arbeiðið kom longur norður. Skjótt lá stór rúgva av sprongdum gróti frá tunlinum oman eftir Tunguni.

Næsta fráboðanin kom seinasta vetur og vár, tá Stórá rann tjúkk í evju í langa tíð. Evjan rann út á sjógv og litaði Sundið grátt út á miðjuna og suður móti Brúnni um Streymin. Allur vøkstur í fjøruni var avtakin av evju úr tunlinum.

Seinasta summar varð farið at gera vatntøkurnar í áunum. Smáar byrgingar at samla vatnið í slokurnar. Tyrla fleyg sum klokkupendil millum vegin og áirnar við betongi. Ikki bara stóru áirnar, men hvør løkur fekk sína vatntøku. Sjey tøkur frá Skálá til Tippisá umframt nakrar norðanfyri Tippisá.

Um árskiftið seinasta varð sagin sett á. Allar tær ovaru greinarnar til Stórá vóru kvettar av. Ikki ein vatndropi sleppur framvið. Stórá liggur nú sum ein skerd eik eftir í lendinum, har krúnan er kvett omanav. Sært tú myndina av fólnaðu innantómu eikini?



*Stórá*



*Vatntøka í Skálá*



*Fossur í Gjønni í regni*



*Fossur í Gjønni 2010*

**Einki hóvasták**

Uttan nakra nærri fráboðan vórðu áirnar við Norðskála knýttar upp í vatnorkuskipanina við Eiðisvatn. Einki hóvasták. Eingin snórur kliptur. Eingi hálovandi tíðindafólk og eingi myndafólk. Hendingin er ikki ein gongd nevnd á heimasíðuni hjá eigaranum, okkara elfelag! Nakrar myndir eru nú á www.varvasteinur.net

Eingin tíðindafundur um, hvussu stórúliga stóran týdning hesar áirnar hava fyri grøna immiggið hjá Føroyum. Einki um fyrimunir og vansar fyri náttúru og umhvørvi á staðnum. Einki um fyrimunir og vansar fyri vinnuvirksemið í Sundalagnum. Eingi framleiðslutøl og einki um, hvussu nógvar CO2 eindir færri verða sleptar út í lofthavið við Føroyar, nú hesar áirnar afturat renna norður í Eiðisvatn. Bara tøgn, deyðatøgn.

**Hvussu sær út?**

Beint niðanfyri vatntøkurnar er so at siga ikki ein dropi av vatni í áunum. Eisini sjálvt um tað hevði regnað náttina frammanundan, eg kom framvið. Fossarnir upp í Gjønni sunnanvert Tingheygg eru so at siga heilt turrir, men niðanfyri fossin rennur ein lítil løkur, sum helst stavar frá keldu har. Í Gjønni er friður nú, kirkjugarðsfriður!

Tippisá er serliga turr meira enn hálva leið oman móti Tippinum, men fossurin í Fossagjógv slapp undan, tí vatntøkan liggur í gjómunnanum. Inni í Fossagjógv ber enn til at hoyra fossin siga søgur og kvøða kappakvæði.

Nógv lendið setir til áargreinarnar niðanfyri vatntøkurnar, so væntandi var, at nakað av vatni fór at vera í ánni, tá vátt var um. Ein vanligan vátan vetrardag rennur Stórá í turrari summarfylling frá landsvegnum omanfyri Norðskála og oman á Móðstøðuna. Í turrari summarfylling mitt um veturin. Tað er lítið at bjóða fremmandafólki.

Nú kavin liggur, er nakað tað sama av vatni í ánni, tá hon kemur oman til landsvegin, sum tá tað hevur regnað. Uppi í Gjønni sunnanvert Tingheygg var løkurin ikki deyðakaldur, men hevði so frætt av jarðarfløga, at hann bræddi kavan, og var opnari her uppi enn longur niðri.

Væntandi verður Stórá sera lítil, tá turkur er um summarið. Fossarnir í Skálagjógv og í Antarvað verða tá bert nøkur hým, sum flaksa í líggja lotinum. Eisini teir. Livst, so spyrst.

# Dýrar tryggingar?

ANDRASS SKAALUM
Tórshavn, valevni til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna



Um eingin kapping er um kundan, verða tryggingarnar ov dýrar.

Frí og opin kapping á tryggingarmarknaðinum, er besta trygd fyri at kundin ikki kemur at gjalda yvirprís fyri tryggingar.

Ein sínámillum avtala um prísir á marknaðinum, har bert tvey feløg eru, kann einans skaða kundan og í longdini eisini tryggingarfeløgini. Vandin kann tá verða, at vit ikki koma at standa okkum í kappingini og gerast taparar fyri útlendskum feløgum.

Í hesi og komandi viku er val til umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna, har eg eri valevni.

Eg vil virka fyri, at kapping framhaldandi er á tryggingarmarknaðinum, til frama fyri teg sum kunda og harvið í longdini eisini fyri tryggingarfelagið.

Fyri at náa bestu úrslitum og bíligast tryggingum, er týdningarmikið, at vit javnan máta og dagføra dugnaskap okkara í mun til bestu aktørar á marknaðinum (Benchmarking).

Niðanfyri er í stuttum onnur mál eg eisini vil arbeiða við:

- Betri gjøgnumskygni so tryggingartakarin fær innlit og kann fylgja við.
- At vit vísa virðing - fyri fakinum, tryggingartakaranum og starvsfólkunum.
- At smærri íleggjarar fáa arbeiðsfrið og ognarfelagið arbeiðir har aðrir ikki røkka.
- At virksemið í mesta mun kemur føroyska samfelagnum tilgóðar.
- At umsita ognir við dugnaskapi og virðing fyri tryggingartakarunum.

Tey, sum hava onkra trygging hjá "Tryggingarfelagið Føroyar" pr. 01. januar í ár, hava rætt at atkvøða.

Atkvøðuseðilin kemur ikki av sær sjálvum, tú skal biðja um at fáa hann sendandi, fyri at tú kann atkvøða.

Atkvøðuseðilin kann umbiðjast á telefon 345600, á t-bræv *umbodsradsval@trygging.fo* - fax 345604 ella við at fara inn eina av deildunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

»Sjáldan fast tað í lag, ið kemur í drag«, tí er umráðandi at fáa hetta avgreitt beinan vegin.

Eg vil við hesum biðja um tín stuðul til Umboðsráðsvalið.